


*Thoralf Solberg, sum starvast á marknaðardeildini hjá SalmoBreed og stjórin í Fiskaaling, Kristian Petersen*
Mynd: Vilmund Jacobsen

# Fiskaaling sær inntøkur í laksarognum

**ALING – Vit á Fiskaaling eru nøgd, um framleiðslan av rognum kann fáast at hvíla í sær sjálvari. Tað er í fyrsta lagi føroyska alivinnan, sum er í okkara huga, men vit hugsa eisini um at selja rogn av landinum til útlendskar laksaframleiðarar, og tá kann talan gerast um eina veruliga forrætning, sigur stjórin í Fiskaaling, Kristian Petersen**

Vilmund Jacobsen

Tá vinnustevnan FaroExpo var í Runavík, hevði Fiskaaling, sum hevði bás á stevnuni, vitjan av norðmanninum, Thoralf Solberg, sum starvast á marknaðardeildini hjá stóra norska kynbótafelagnum, SalmoBreed.

Fiskaaling og SalmoBreed hava fyrr í heyst skrivað undir samarbeiðsavtalu, har norska kynbótafelagið skal veita Fiskaaling útvald rogn, ið eru kynbøtt eftir teimum ynskjum, sum føroyska alivinnan hevur.

Avtalan, sum fyribils verður galdandi í fýra ár, merkir, at Fiskaaling fer at klekja rognini við Áir, og síðan verður yngulin aldur til lívfisk á lívfiskastøðini í Skopun, til hesin verður strokin, og rognini seld – fyrst og fremst til føroysku alivinnuna.

Føroyskir alarar kunnu soleiðis vænta sær fyrstu rognini úr hesum samstarvi á heysti í 2014.

### Trygg heilsustøða

Bæði Fiskaaling og SalmoBreed eru spent upp á hetta samstarv, sum feløgini meta fer at geva báðum pørtum – og føroysku alivinnuni - nakað.

**... Fiskaaling og SalmoBreed eru spent upp á nýggja samstarvið, sum feløgini meta fer at geva báðum pørtum – og føroysku alivinnuni - nakað...**

Kristian Petersen, stjóri í Fiskaaling og Thoralf Solberg á marknaðardeildini hjá SalmoBreed, siga, at samarbeiðsavtalan fer at tryggja føroyskum alarum tilgongd til fremsta kynbótaarbeiði í heiminum, samstundis sum øll framleiðslan frá eygarogni fram til strúking fer fram á landi í Føroyum.

– Hetta skal verða við til at tryggja góðu heilsustøðuna, sum føroyska alivinnan hevur í dag, siga teir báðir.

Á vitjanini í Føroyum var Thoralf Solberg ein túr í Skopun og vitjaði á Lívfiskastøðina har, og hann var eisini á Fiskaaling.

– Eg haldi, at hann var væl nøgdur við tað, sum hann sá, sigur Kristian Petersen.

### Hyggja frameftir

Leingi hevur verið ógreitt, hvør lagnan hjá Lívfiskastøðini í Skopun fór at verða.

Á støðini gongur lívfiskur, men seinnu árini hevur einki verið gjørt við veruligt kynbótaarbeiði, sum er rættiliga kostnaðarmikið virksemi, ið stór kynbótafeløg uttanlands brúka nógvar miljónir upp á um árið.

Føroyskir alarar hava tó verið óførir at keypt føroysk rogn, og enn í dag hevur Fiskaaling ein marknaðarpart í Føroyum, sum liggur oman fyri 50%.

Eitt av málunum við samarbeiðsavtaluni millum Fiskaaling og SalmoBreed er, at marknaðarparturin í Føroyum skal styrkjast enn meiri, eins og feløgini upp á longri sikt hugsa um útflutning av rognum til onnur lond.

### Geva inntøkur

Kristian Petersen, stjóri í Fiskaaling, sigur, at rognini, sum føroysku alararnir fáa um eini trý ár, verða rogn, sum tá hava verið undir eftirliti alla tíðina.